# DBERG-VARIASJÓNIR




*Meg, uppstásað, saman við tí tvitna terroristinum McCann. Tey leikandi eru Eileen Atkins og Finbar Lynch*

Pinter samstundis neyvt 20. og 21. aldar politiska gerandisdag. Stanley, riknan í tronga av maktini, við bankandi títlingshjarta, finna vit í pínslukjallarunum hjá Saddam, Stalin ella Hitler, í kirkjunum í Rwanda í 1994 (sum ofta einki skjól veittu), í Usbekistan og Abu Ghraib.

EG VAR so heppin at hava fingið sess í øðrum rað á gólvinum í the Duchess Theatre, skamt frá pallinum. Og eina ferð enn mátti ein sanna, at enskur sjónleikur - tá hann er bestur - neyvan verður tikin. Sinead Matthews sum Lulu, Geoffrey Hutchings sum Petey og Finbar Lynch sum McCann leika øll sannførandi. Um Paul Ritter sum Stanley er at siga, at hansara avrik var so fullkomið, at ein frá byrjan gloymdi alt um sjónleik, av teirri orsøk, at identifikasjónin var lýtaleys. Hvussu kann hann fara út á gøtuna eftir hetta? hugsaði eg, tá lógvabrestirnir fullu.

Men høvuðsrollurnar høvdu tey bæði Eileen Atkins (sum Meg) og Henry Goodman (sum Goldberg). Um Eileen Atkins er at siga, at hon er millum tey mætu nøvnini í enskari leiklist og hevur havt eitt ótal av leiklutum í sjónleiki, sjónvarpi og filmi. Sjálvur havi eg sæð hana á palli tvær ferðir fyrr - í eini glæsiligari uppseting av Ibsens *John Gabriel Borkman* - sum dagar upp um flestu sjónleikir, sum ein háreistur tindur, við snjóskørðum og glerknúkum í erva - og, í 1997, í eini ógloymandi framførslu av *A Delicate Balance* eftir Edward Albee.

Uppgávan í *The Birthday Party* man vera út av lagi krevjandi, tí Meg skal, við sínum eitt sindur ótýdliga áhuga fyri sínum gesti, vera vakin, men hon skal samstundis sova: hon varnast ikki, hvat veruliga fer fram og veit, tá ið leikurin er av, ikki, at hennara elskaði Stanley er eitt vrak, eitt lívleyst hylki, nú uppstásað, klætt í lýtaleysan borgaraham, kanska enntá tunguleysur. Men Eileen Atkins faftraði ikki á eina løtu.

Henry Goodman er, eins og Pinter sjálvur, føddur og uppvaksin í East End í London. Eisini hann hevur havt eitt ótal av leiklutum, ikki minst úr leikum eftir Shakespeare. Sum Goldberg leikar hann so úrlíka væl, við slíkum neyvleika, við slíkum hegni til at bera fram eitt smikursøtt fínmentað klisjemál, sum samstundis er travesti, óhugnadæmd glasing uttan á barbarii og morði, at hyggjarin bara situr og gapar. Ber tað til at leika so væl? spyr ein seg sjálvan. Jú, er svarið, har Edward Alleyn og Richard Burbage einaferð virkaðu, ber tað til.

MEN HØVUÐSGRUNDINA til, at ein slík framførsla kann gerast ein stórsigur, finna vit í tí stætti, sum ber steypið, í hondverkinum hjá Harold Pinter. *Føðingardagsveitslan* varð sum nevnt framførd fyrstu ferð í 1958, í the Arts Theatre í Glasgow. Saman við leikum eftir Brecht, Beckett og Osborne var hesin leikur við til at nútíðargera og umskapa bretska leiklist.

Tað var tó frá byrjan greitt, at Pinter hevði eina rødd, sum var eyðkend og bara hansara, eitt neyvt, myrkt og intenst mál, søkklaðið av hóttan, angist og duldari vreiði. Sum aðrir leikir komu frá honum - eitt nú *Húsavørðurin*, 1959, og *Heimkoman*, 1964 - varð greitt, at hann í grundini er yrkjari, ein dapurleikans, trongans, men eisini ein uppreistrarins og frælsisins hásyngjari, ein patriarkatsins lýriski húðfleingjari. Og longu áðrenn hann skrivaði *The Birthday Party*, hevði høvundurin við eini yrking, ið mest minnir um eitt kvæði ella eina balladu, ímyndað sær allan leikin:

*They played at blind man´s buff,*
*Blindfold the game was run,*
*McCann tracked Stanley down,*
*The darkness down and gone*

*Found the game lost and won,*
*Meg, all memory gone,*
*Lulu´s lovenight spent,*
*Petey impotent;*

*A man they never knew*
*In the centre of the room,*
*And Stanley´s final eyes*
*Broken by McCann.*

Yrkingin ber prógv um, at *Føðingardagsveitslan* ikki er eitt hugsað verk, men fesklika kveikt og føld list, við persónum úr holdi og blóði. Hinvegin er heldur ikki eitt so satt verk sprottið úr ongum. Harold Pinter hevði, tá hann skrivaði leikin, spælt í eini ørgrynni av meira ella minni kabarettkendum leikum, og greipan Goldberg-McCann kann hava røtur og fyrimyndir í tátíðar *music hall* mentan, í nú gloymdum teitum og kabarettum.

MEN AÐRAR tilelvingar kunnu eisini hugsast. Á nítjan ára aldri las Pinter skaldsøguna *Der Prozess* - Sakarmálið - eftir Franz Kafka. Bókin bleiv liggjandi, goymd og ikki gloymd, í hansara andaliga kufferti, og um 1990 varð hann biðin um at skriva handrit til eina filmútgávu av skaldsøguni. Pinter legði tá dent á at lata søgugongdina hava ein - ikki, sum vanligt, ekspressionistiskan - men realistiskan karm, tí, sum hann helt fyri, henda søgan er hvørki abstrakt ella furðulig, men beint frameftir og skilvís. Trupulleikin hjá Jósef K er, at hansara skilvísi, dirvi og vit, so fyrimyndarlig tey annars kunnu vera, ikki gagna honum - av teirri orsøk, at hann, uttan at vita av tí, leikar í einum loyndum handriti, hvørs høvundur er á aðrari, gátuførari, uttanjarðligari bylgjulongd. Handritið tykist, so langt menniskjan kann hóma, høpisleyst:

*Ein yvirskrift, eg hevði sett á* Sakarmálið *er: Hvat spæl leikar Gud? Tað er tað, sum Jósef K í roynd og veru spyr. Og tað einasta svarið hann fær er ógvuliga harðrent ("a pretty brutal one").*

Tann, sum sær ella lesur *The Birthday Party*, hevur ikki ilt við at kenna Kafka aftur. Seinast í skaldsøguni verður Jósef K. av tveimum tignarligum harrum í svørtum diplomatfrakkum og undir hatti førdur út um býin til avrættingar í einum grótbroti. *Føðingardagsveitslan* kann síggjast sum ein dramatiserað útgáva av skaldsøguni, har hesir garpar hava fingið høvuðsleiklutir, og somuleiðis kann gentan Lulu (møguliga) síggjast sum ein pintersk Frälein Bürstner.

Men ber til at toyggja henda samanburðin longur? Er ein heimspekiligur líkleiki millum skaldsøguna hjá Kafka og leikin hjá Pinter? Tað er ikki lætt - og kanska heldur ikki rætt - at svara beinleiðis upp á henda spurning.

Men eins og ein dómari, hvørs andlit verður verandi fjalt, sveimar onkustaðni uppi yvir teirri villiniborg, har Jósef K. reikar, soleiðis eru bæði Goldberg og McCann í evstu syftu amboð, bæði ómetaliga eirindaleysir og samstundis bangnir og fjálturstungnir boðfretar hjá einum felagsskapi, teir rópa "the organisation", hvørs ovasti harri eisini er krógvaður. Lagnuna hjá Jósef K. ella Stanley kenna vit. Orðaskiftið um Dómaran - høvundin at tí loynda handritinum - kann so halda fram, kanska so leingi menniskju eru til.

*Harold Pinter: The Birthday Party. Duchess Theatre, Catherine Street, London WC2.*